## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Um kvøldið snarar hann í landsynning og veksur vindin nakað. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av landsynningi og regn, men um middagsleitið støkkur hann vesturum til vestan og útsynning og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og suðri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 7 og 11 stig.

# Sæurðardrangur



Sum vit koma krúpandi heim við landinum undan Barðinum heim móti Gásadali stendur hann knappliga har. Sæurðardrangur, sum leyp út úr mjørknum, ið annars hevur ligið tungur langt niður í bergið.

Nú síggja vit eisini eitt sindur av landinum innanfyri og upp í Heinafjall ella Heinanøvu, alt eftir hvønn tú tosar við.

Her stendur hann so. Eitt tekin um megi og mátt, sum megnaði at standa ímóti, tá havið fór við tí lendi, sum runda um var. Bæði innan- og uttanfyri. Og til báðar síður.

Men ikki hevur hann kortini fingið frið at staðið óskaløður hesa tíðina. Brýnt verður burtur av alla tíðina, og einaferð verður hann ivaleyst eisini við undirlutan. Kanska uppliva vit tað? Kanska ikki? Hvør veit?

Ikki er hann einsamallur, sum stendur soleiðis við føroysku strendurnar. Teir eru nógvir av hansara brøðrum, sum hava staðið soleiðis í øldir og enn standa og bíða eftir, at vit koma framvið at vitja. Hyggja at. Og ikki minst síggja teir.

Tí ferðamøguleikarnir og vakurleikin í Føroyum er sum fáa staðni. Men vit vita tað ikki. Tað vil siga, at nógvir føroyingar vita tað ikki.

Men møguleikarnir eru har. Nógv eru tey, sum bjóða seg fram at vísa okkum landið. Tað er bara at taka av.

Tað er lætt. Tað er bíligt. Og tað er vakurt.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 6 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 15 |
| Tromsø | 12 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 13 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 19 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 24 |
| Paris | 15 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 25 |
| Malorca | 28 |
| Athen | 33 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 28 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | 17 |
| New York | -- |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | 17 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 11 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1006 hPa. sunnan fyri Hvarvið fer í landnyrðing og dýpist. Ein hátrýstryggur 1015 hPa. vestan fyri Føroyar verður yvir Føroyum týsdagin.



**Í dag:**
Lágtrýstið í útsynning úr Íslandi stendur mestsum í stað og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikumorgunin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 11/07 kl. 06⁰⁰–12/07 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 11/07 kl. 06⁰⁰–12/07 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juli: 19,1 mm




fæst á apotekunum kring landið

## VESTFALLSKYRRINDI

1. juli: Mánin næstur jørðini
5. juli: Jørðin longst frá sólini
9. juli: Seinna kvarter
14. juli: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 13. juli | 04.31 | 16.54 | 03.31 | 15.54 | 03.46 | 16.09 | 06.31 | 18.54 | 07.31 | 19.54 | 02.46 | 15.09 | 01.46 | 14.09 | 04.46 | 17.09 | 05.46 | 18.09 | 04.16 | 16.39 | 05.31 | 17.54 |
| 14. juli | 05.18 | 17.42 | 04.18 | 16.42 | 04.33 | 16.57 | 07.18 | 19.42 | 08.18 | 20.42 | 03.33 | 15.57 | 02.33 | 14.57 | 05.33 | 17.57 | 06.33 | 18.57 | 05.03 | 17.27 | 06.18 | 18.42 |
| 15. juli | 06.05 | 18.29 | 05.05 | 17.29 | 05.20 | 17.44 | 08.05 | 20.29 | 09.05 | 21.29 | 04.20 | 16.44 | 03.20 | 15.44 | 06.20 | 18.44 | 07.20 | 19.44 | 05.50 | 18.14 | 07.05 | 19.29 |
| 16. juli | 06.52 | 19.15 | 05.52 | 18.15 | 06.07 | 18.30 | 08.52 | 21.15 | 09.52 | 22.15 | 05.07 | 17.30 | 04.07 | 16.30 | 07.07 | 19.30 | 08.07 | 20.30 | 06.37 | 19.00 | 07.52 | 20.15 |
| 17. juli | 07.37 | 20.00 | 06.37 | 19.00 | 06.52 | 19.15 | 09.37 | 22.00 | 10.37 | 23.00 | 05.52 | 18.15 | 04.52 | 17.15 | 07.52 | 20.15 | 08.52 | 21.15 | 07.22 | 19.45 | 08.37 | 21.00 |

5 707265 100029 >